# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Brúðarmyndir




*Øllum tykkum sum á ymiskan hátt mintust og gleddu okkum á gullbrúdleypsdegnum tann 1. februar 2006 takka vit hjartaliga.*
***Vinarlig heilsan Tove og John***



*Hjartaliga takka vit tykkum øllum ið vóru við til, at gera brúdleypsdag okkara hin 30. desember 2005 ógloymandi.*
***Kærar heilsur Rannvá og Suni Hansen***



*Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara tann 12. november 2005 takka vit hjartaliga.*
***Sólrun og Egin Fríði Ørvaroð***

## Minningarorð um
# Signhild Magnussen
## á Teigum í Famien
## Minni um eina heimsmammu

At sita við komfýrhitan í køkinum úti á Teigum og líta at Signhild meðan hon við gandakendum rørslum toygdi, faldaði, toygdi, faldaði og mýkti gylta sukurdeiggjið, sum sá út sum hárið á eini fagrari ungmoy, var líka so hugtakandi sum at síggja Hans Paula modellera standmyndina av Sigmundi Brestissyni. Hetta var list á høgum støði í míni barnaverð og visti eg, at Signhild gjørdi brøstsukur, var eg sum eitt fok út á Teigar. Ikki sum tey flestu, at fáa ein bita av lidnu vøruni, men at njóta listarverkið, álvadansins sum fór fram í fjálga køkinum hjá fastur míni, Signhild Magnusen, sum andaðist í Keypmannahavn 2. páskadag.

Køkurin á Teigum, serliga innvikið við borðinum og bonki á 3 síðum, hugtók meg altíð. Har ótu vit, har vóru hundraðtals søgur til álvara og gaman fortaldar, har las maður Signhild úr Bíbliuni sunnudagar og har sótu vit ungdómar og hunaðu okkum meðan "normaðurin" gletti um kapp við láturin, alt meðan Signhild gekk um okkum sum ein verulig heimsmamma.

Við Signhild fór eg til neytar og lærdi meg so dánt at mjólka, við Signhild, Erlend, Sannelinu, Jastrid og Andrew fór eg í hagan við og eftir neytunum og viðhvørt viltust vit í mjørkanum. Edward var so mikið eldri, at hann var líkasum ikki við í barnaárunum – men ikki minni var hann ein av hennara, ein slóðari.

Hóast miðdepilin í Famien var yviri í Trøðum hjá abbanum og ommuni, var ikki dagur at eg – helst í fylgi við hundinum Pass, skundaði mær tvørtur um bøðin, meðan abbin skeldaði í bakgrundini, tí grasið skuldi hava frið ella eg fór kikur eftir vegnum framvið heiminum hjá Johan Dahl, heilsaði uppá hendan og handan, snaraði um hornið hjá Margestinu og snoddaði mær vegin fram til eg svangur eftir upplivingum, lendi á bonkinum hjá Signhild.

Ikki tí, Signhild gjørdi einki burturúr sær sjálvum, heldur hinvegin. Men á ein ella annan fjálgan hátt, so fylti hon alt, og alt sum hendi á Teigum var onkursvegna ongantíð liðugt fyrrenn Signhild hevði sett sítt innsigli á verki, ofta við einum heitum munni, heimagjørdum ísi ella einum ríviligum grindafati.

Seinni, tá eg arbeiddi við heilaskaddum í Dianalund í Danmørk, vaknaðu øll minnini um heimsmammuna Signhild. Tveir av sjúklingunum sum vóru til afturvenjingar vóru av Tvøroyri, annar hálvur famieningur og hin sonur eina góða vinkonu hjá Signhild. Og altíð var navn hennara á loftið! Antin vóru tað teir báðir sum róstu henni ella var tað mamma tann eina ella familjurnar, tá tær komu at vitja.

Øll tosaðu um Signhild við hita og myndirnar, tey málaðu av fastur míni vóru av eini altfevnandi heimsmammu, sum fylti meiri, var meiri, dugdi meiri og hevði størri týdning hjá øllum – antin so ella so – enn flest øll onnur menniskju.

Ikki tí, eg havi ikki verið raskastur at vitja og seinast eg var í Famien, var hon burturstødd. Men burturstødd alla ikki – ella um eg var burturstaddur, so var hon altíð har. Men neyvan hevði Signhild tað frá fremmandum. Soleiðis var omman yviri í Trøðum, tað var sum Signhild meiri og meiri sum árini gingu, var ein reinkarnatión av elskaðu – heimsins bestu – ommu míni, Andreu Ellendersen.

Saknurin kann ikki annað enn vera stórur hjá tykkum børnum, men eins stór verður gleðin, tá minnini um Signhild fara at læra tykkum – og okkum øll, at Signhild, onkursvegna, altíð er har, eisini yviri í Trøðum hjá tær, John og Kirstin, sum hava havt tykkara dagliga samskifti við hana øll árini.

Við hesum lýsi eg frið yvir minni um heimsmammuna, fastur mína, Signhild Magnusen.

Hvíl í friði.

**Heilsan Jón, bróðursonurin**

# Føðingar

11. apríl fingu Judith Ludvig og Danial Christoffersen, Sandavágur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3425 gr.

12. apríl fingu Louisa A. Fjallsbak og Julian J. Thomsen, Tórshavn, tvíburar, gentu og drong. Gentan var 43 cm. long og vigaði 1665 og drongurin var 47 cm. langur og vigaði 2210 gr.

13. apríl fingu Anna Maria Egholm og Pætur Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3125 gr.

15. apríl fingu Linda Miezan og Svenning Winther Hansen, Argir, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3750 gr.

15. apríl fingu Ása Højgaard og Benny Ejdesgaard, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3350 gr.

16. apríl fingu Joan Niclasen og Áki Ellendersen, Argir, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 2805 gr.

18. apríl fingu Eyðbjørg Jacobsen og Poul Henning Jacobsen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3800 gr.

18. apríl fingu Eva og Jákup Klein, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4700 gr.

19. apríl fingu Jóhanna og Arni Carlsen, Toftir, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3750 gr.



*18. apríl fingu Rúna Simonsen og Jógvan Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4100 gr.*

19. apríl fingu Magna L. Joensen og Mouritz L. Mohr, Fuglafjørður, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3350 gr.

20. apríl fingu Margaret L. Kjelnæs og Heri Kjelnæs, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3550 gr.